Hjørleif Waag Høgnesen:

# Organistur í 30 ár



**Í ár hevur Hjørleif Waag Høgnesen úr Klaksvík verið organistur í Christianskirkjuni í 30 ár. Sunnudagin verður dagurin hildin við eini lítlari hugnaløtu í kirkjukjallaranum, sum kirkjuráðið skipar fyri**

STARVSDAGUR
*Solby A. Eliasen*

**Klaksvík:** Hjørleif byrjaði við at loysa av sum organistur í Christianskirkjuni í 1969. Í 1972 bleiv hann so fastur organistur, og hevur hann røkt hetta starv nærum einsamallur í 30 ár. Starvsdagurin sjálvur var fyrr í ár, men nú verður hann so hildin fyrsta sunnudagin í advent, sum eisini er fyrsti sunnudagurin í nýggja kirkjuárinum.

Vanlig gudstænasta verður fyrst sunnumorgunin við Hans Eileri Hammer og sjálvandi fer Hjørleif at sita við urguna og spæla. Eitt nú, Ver vælkomið Harrans ár, sum altíð verður sungin fyrsta sunnudagin í einum nýggjum kirkjuárið.

Tá gudstænastan er liðug, bjóðar kirkjuráðið ábit í kirkjukjallaranum, har Hjørleif eisini fær eina gávu handaða fyri trúfasta tænastu øll árini.

*Hjørleif Waag Høgnesen hevur spælt upp á urguna í Christianskirkjuni í 30 ár. Í morgin skipar kirkjuráðið fyri hugnaløtu í kirkjukjallaranum aftan á gudstænastuna*




## Hvør er ársins jólagáva 2002?

- Hvussu slepst skjótast úr Fugloy suður til Akraberg?
- Við at svara so nógvum spurningum sum møguligt rætt í nýggja, føroyska spurnaspælinum "**Landastrok**".

"**Landastrok**" er eitt spurnaspæl um føroysk viðurskifti. Teir 2880 spurningarnir eru flokkaðir eftir hesum evnum: søga, náttúra, landalæra, ítrótt, mentan og almenn vitan - og eru ein breið lýsing av Føroyum og føroyskum viðurskiftum.

"**Landastrok**" er ársins jólagáva til føroysku familjurnar 2002 og tryggjar nógvar hugnaligar, spennandi og læruríkar tímar saman við vinum og kenningum.



SISERO 351800

Frá í komandi viku verður spælið at fáa á hesum støðum:

| *Bygd / býur* | *Handil* |
|---|---|
| Klaksvík | Leikalund |
| Saltangará | Leikabúðin |
| | Bókabúðin |
| Fuglafjørður | Hjá Haraldsen |
| Tórshavn | Hjalmar Jacobsen |
| | BR Leikur |
| Miðvágur | Føroya Keypssamtøka |
| Sandur | Eldhús |
| Tvøroyri | Hjá Karl Jespersen |

- vit eru eisini við á sølustevnuni í Runavík 7.-8. des. - á básinum hjá Frú S.

fyri einans













# Misnøgdir við samanlegging: Kollfirðingar gera uppreistur

**Veljarar í Kollafirði melda seg nú úr fólkaflokkinum í uppreistri fyri at mótmæla býráðspolitikkinum síðani kommunusamanleggingina og tey fara aldrin aftur at stuðla flokkinum til býráðsval**

KOMMUNU-SAMANLEGGING
*Áki Bertholdsen*



*– Tað ljóðaði so ljósareytt, tá ið kollfirðingar vórðu bidnir um at leggja saman við Tórshavnar Kommunu. Men úrslitið er eitt vónbrot, tí hvørki vinnulivið í Kollafirði ella bygdarfólki, fáa nakrar sømdir, sigur Rólant Christensen í Kollafirði, sum nú meldar seg úr fólkaflokkinum fyri at mótmæla arbeiðslagnum*

– Tað hevur verið ein vanlukka fyri kollfirðingar, at vit løgdu saman við Tórshavnar kommunu.

Rólant Christensen í Kollafirði, ivast onga løtu í, at tað kemur at kosta fólkaflokkinum dýrt, at kollfirðingar fáa so út av lagi vánaligar sømdir frá Tórshavnar Býráði.

Sjálvur hevur hann verið nevndarlimur í fólkafloksfelagnum í Norðstreymoy og í seks ár hevur hann verið virkin fólkafloksmaður í Kollafirði.

Men alt tað hevur nú fingið ein enda, tí hann hevur gjørt av at melda seg úr felagnum fyri at mótmæla viðferðini, sum kollfirðingar hava fingið frá Tórshavnar Býráð.

Og tað skilst á honum, at hann er langt frá tann einasti, sum vendir fólkaflokkinum bakið.

– Fólkafloksfelagið í Norðstreymoy í uppløysingini og formaðurin hevur boðað frá, at felagið er tikið av.

– Eg fari aldrin aftur at atkvøða fyri fólkaflokkinum til býráðsvalið og fólkaflokkurin skal ikki gera sær nakrar sum helst vónir um at fáa umboð valt í Kollafirði aftur.

– So skal eg heldur velja sosialistiskt næstu ferð – og verða tikin á bóli tann positiva vegin, tá ið politisk stig kortini verða tikin tann borgarliga vegin, sigur Rólant Christensen.

### Venda vinnuni bakið

Rólant Christensen minnist, at tey annars høvdu sett stórar vónir til at leggja saman við Tórshavnar Kommunu.

– Tey lovaðu okkum gull og grønar skógir, bara vit vildu leggja saman við Tórshavnar kommunu, bæði ítróttahøll og annað.

Kollfirðingar tóku seg eisini dyggiliga saman um fólkafloksmannin Jákup Suna Joensen, fyri at at fáa umboð í býráðið í Havn.

– Men samanleggingin hevur verið eitt stórt vónbrot tí síðani er tað bara blivið verri í Kollafirði.

Ikki minst tí at Tórshavnar Býráð fleiri ferðir tekur avgerðir, sum forðar vinnuni vinnuni í Kollafirði í at virka.

Rólant Christensen veit meiri enn eitt dømi um, at Tórshavnar Býráð hevur noktað vinnuvirkjum í Kollafirði at byggja ella at byggja út og tað hendir uttan stórvegis samskifti ella hóvasták, men rætt og slætt við fútabanni. Býráðið hevur viðhvørt ongantíð verið í sambandi við partarnar, sum verða steðgaðir.

– Fleiri virki høvdu lagt byggiætlanir onkur hevði projekterað og onkur hevði fingið byggiloyvi, men varð steðgaður aftur.

Sostatt er tað komið fyri, at Tórshavnar Býráði enntá annulerar avgerðir, sum gamla bygdaráðið í Kollafirði tók.

Samstundis vísir hann á, at Tórshavnar Kommuna í størri og størri mun tekur arbeiði frá privatu vinnuni.

– Fólkaflokkurin hevur altíð talað og skrivað um privat fyritakssemi, men í verki arbeiðir flokkurin beint øvugt og tekur meiri og meiri frá tí privata og leggur tað undir kommununa.

– Tórshavnar Kommuna hevur keypt nógva útgerð av alskyns slagi og tekur sostatt arbeiði frá privatu vinnuni.

– Í Kollafirði hava tað altíð verið privata vinnan, sum hevur havt eftirlit við gøtuljósum, fyri at nevna eitt dømi. Men síðani Tórshavnar kommuna yvirtók tað arbeiði hevur lítið skil verið í, tí tað er í heilum, at gøtuljós eru farin og tað er eisini hent, at allar lyktirnar á longum strekki hava verið brostnar.

Annars heldur Rólant Christensen, at ógvuliga lítið er hent í Kollafirði síðani samanleggingina. Og ítróttarhøllin, sum ætlanin nú er at byggja, varð eisini slept og nú er ætlanin at byggja eina nógv minni høll ístaðin, sum ikki kann brúkast til nakað sum helst.

– Tað hevði heldur onga ávirkan, at nógv húski við børnum savnaðu inn undirskriftir um busskoyringina fyri at beina hana burtur av tí smala bygdarvegnum, har børnini spæla og heldur brúka tann breiða vegin, tí hjá ferðafólki ger tað ongan mun – og tað eru ikki meiri enn 15-20 metrar ímillum busskýli hjá bygdaleiðum og tað hjá Bussleiðini.

Rólant Christensen leggur afturat, at skúlabarnaflutningurin er so vájnaligur, at hann rætt og slætt er við at forða børnunum úr Kollafirði at ganga í framhaldsdeild, tí nú skulu tey í 8.,9. og 10. flokk í Havn.

Men sambandið er so vánaligt, at tey mugu upp klokkan gott seks á morgni og við bussi úr Kollafirði klokkan 7.10 um morgnarnar og eru ikki heima aftur, fyrrenn kl. 16- 16-30.

– Sostatt hava børnini longri arbeiðsdag enn nakar í Býráðnum og tað sigur seg sjálvt, at tað er ikki nógv orka eftir til at skúlating eftir so langan dag.

### Hjálpir onki

Kollfirðingurin sigur, at tey hava ferð eftir ferð bæði vent sær til býráðslimin hjá kollfirðingum, Jákup Suna Joensen og til aðrar býráðslimir um viðurskiftini.

– Antin er burturforkláringin tann, at hetta er ikki teirra øki, og er tað teirra øki, siga teir, at umsitingin sigur, at tað skal vera so ella so.

– Sostatt hava býráðslimir givið alt valdið í kommununi upp í hendurnar á umsitingini. Býráðið í Havn er tískil ikki eitt fólkavalt stýri, men eitt embætisvald.

– Tað nyttar heldur ikki at tosa við fólkafloksfelagið í Kollafirði, tí haðani fæsr onki svar uttan tað, at felagið er ikki til longur.

Tí heldur hann, at royndirnar av samanleggingini eru so vánaligar, at tað fer at hevna seg aftur hjá fólkaflokkinum til komandi býráðsval.

## Skilir væl at kollfirðingar eru ónøgdir

Í sambandi við misnøgdina hjá Rólant Christensen omanfyri um ónøgdina hjá kollfirðingum við Tórshavnar Býráð, høvdu vit tosað við býráðslimin úr Kollafirði, Jákup Suna Joensen. Men av tekniskum orsøkum fáa vit ikki prenta hana fyrrenn týsdagin.

Fyri ein part skilir hann væl ónøgdina, men hann vísir eisini á, at nú eru kollfirðingar partur í einum stórum apparatið og at nógv tiltøk verða framd í næstum

# Nósakapping á Tvøroyri

**Í allan dag verður stór fótbóltskapping fyri børn í ítróttarhøllini í Trongsivági. Liðini, sum vinna, fáa steyp frá Nósa**

BARNAKAPPING
*Áki Bertholdsen*

Í allan verður ítróttarhøllin í Trongisvági karmur um eina stóra fóltbóltskapping fyri børn.

Tilsamans hava 46 lið meldað til kappingina og tey koma úr øllum feløgunum í oynni, bæði úr Sumba, Vági, Tvøroyri og úr Hvalba.

Eitt lið norðaneftir hevði boðað frá luttøku, men tey settust aftur, tí veðurlíkindini eru so vánalig.

Kappast verður í fleiri aldursbólkum, heilt frá teimum minstu, upp til drongir.

Kappast verður í hesum bólkum: Minismápiltar, smápiltar, piltar, smágentur, smádrongir og drongir.

Sostatt verður ein ørgrynna av dystum í høllini leygardagin og tí verður lagt til brots longu frá morgunstundini. Kappingin byrjar klokkan 9 í morgun og heldur fram allan dagin og væntandi er ikki, at hon endar, fyrrenn klokkan 8 - 8.30 í kvøld.

Hvør dystur varar í fimm minuttir og liðini, sum vinna og verða nummar tvey og trý, fáa heiðursmerki frá Nósa.

Samstundis fær tann, sum avrikar okkurt serliga hegnisligt, tað kann vera eina góða fintu, eitt gott mál, ella okkurt annað snilt, eisini okkurt frá Nósa.

Hetta er aðru ferð, at TB skipar fyri innandura fótbóltskapping fyri tey smæstu og líkt er til, at hetta verður eitt afturvendandi tiltak um heysti.

Kappingin byrjar við kappingini hjá smágentunum, sum byrja klokkan 9 og tær eru lidnar kl. 9.50

Tá byrja minismápiltarnir, smápiltar byrja kl. 11.40, smádrongirnir kl. 14.30 og piltarnir kl. 16.30. og smádrongirnir kl. 18.10.

Teir ymsu aldursbólkarnir verða gjørdir lidnir so hvørt og heiðurstekin verða handað eftir hvørja kapping.

Og fyrireikararnir siga, at tíðarætlanin fer at halda.